# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

*– Nei her eru als ongin gummibein...Vit hava alla tíðina trúð upp á okkum sjálvar, og tað gera vit framvegis nú vit hyggja fram ímóti dystinum móti NSÍ sunnudagin*

*Egil á Bø, liðformaður hjá EB/Streymi*

EB/Streymur – ÍF 2-0 (2-0)

# Dreymamál reistu oddaliðið

*EB/Streym*

*ÍF*

**Tvey dreymamál reistu oddaliðið á Mølini tá toppur og botnur í Formula-deildini brustu saman. EB/Streymur spældi ÍF sundur og saman í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki var ikki sama ferð yvir oddaliðnum, sum kortini ikki loyvdu fuglfirðingum fram at máli sínum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Fuglfirðingar royndu at fylgja við EB/Streymi, men munurin millum topp og botn var staðfestur á Mølini í gjár*

*Mynd Sofus D. Johannesen*

Toppur og botnur brustu saman í útsetta dystinum á Mølini mikukvøldið. Nógv hevur verið tosað um møgulig gummibein á Eiði, og at hetta var nakað botnliðið mátti gera sær dælt av í royndinum at sleppa undan niðurflytingini.

Men tá fyrri hálvleikur var av á Mølini, hevði EB/Streymur staðfest munin millum liðini bæði, og hóast seinni hálvleikur var lítið áhugaverdur og EB/Streymur á ongan hátt beit frá sær, so var sigurin ongantíð í vanda.

### Dreymamál

EB/Streymur gjørdi beinanvegin greitt, at tað vóru teir, ið settu treytirnar, tá dysturin skuldi spælast. Tá tíggju minuttir eru spældir vera fuglfirðingar ávaraðir, tá Rafal Kwiecinski buldrar eitt langskot á tvørtræið.

EB/Streyma-liðið tóktist at vera vælupplagt, og á ongan hátt nervað av gummibeinstosinum. Stuttir bóltar, langir bóltar, driblingar og fintir. Alt riggaði sum tað skuldi, og fuglfirðingar vórðu púrasta settir úr spælinum.

Tjúgu minuttir inn í dystin fær EB/Streymur hol á. Bólturin verður fluttur niðan í vinstru síðu, og tá teir nærkast brotsteiginum, verður bólturin latin Teiti Joensen, sum stendur longur inni á vøllinum. Hann lyftur bóltin út aftur í høgru til Arnbjørn, ið leggur bóltin við bringuni og fluktar bóltin flatt yvir í handara málhorn. Eitt vakurt og vælspælt mál frá EB/Streymi.

Løtu seinni er Arnbjørn aftur nær við, tá hann í samband við eitt hornaspark er um at beina bóltin í netið.

Alt bendi á, at her var meiri enn tað eina máli frá EB/Streymi í væntu, og tað staðfesti Rafal Kwiecinski, tá hálvur tími var spældur, tá hann enn einaferð rakti tvørtræið við einum kanónskoti.

Væntaða málið kom so, tá góður hálvur tími var spældur, og var málið frá Arnbjørn flott, so var málið frá Hans Paula ikki minni gott.

Eitt innlegg verður lagt inn í brotsteigin úr vinstru, men bólturin støkkur út aftur í vinstra borð. Har stendur Hans Pauli, og á sjálvum brotsteigarmarkinum heilfluktar hann bóltin við vinstra bólti upp í handara málhorn. Eitt satt dreymamál frá snurritøppinum úr Vík.

Fimm minuttir fyri leiklok var Arnbjørn aftur framvið, tá hann snildisliga við hælinum legði bóltin í netið, men linjuverjin hjá væIdømandi Dagfinni Olsen veittraði fyri rangstøðu og tí varð málið kolldømt.

Seinastu minuttirnar fyri hálvleik vitjaði ÍF í EB/Streyma-brotsteiginum fyri fyrstu ferð í dystinum, men ongin veruligi vandi stóðst av hesum.

### Sleptu speedaranum

Seinni hálvleikur gjørdist ongin fótbóltsupplivíng. Vertirnir høvdu nú slept speedaranum, tað var longri millum keturnar og sendingarnar lógu ikki eins væl sum í fyrra hálvleiki. Óskipað er besta lýsingin av oddaliðnum seinastu trý korterini, har tað heilt sjónligt, at leikararnir vóru nøgdir við tveymálsleiðsluna.

Fuglfirðingar vóru hinvegin lítið frægari enn í fyrra hálvleiki. Hugflogið frameftir vøllinum var ógvuliga avmarkað. Hanus Eliasen royndi at sprella viðhvørt, men hevði truplar arbeiðsumstøður einsamallur á toppinum móti Egil á Bø og Fróða Clementsen.

Fáir møguleikar vóru at hóma, og burtursæð frá tí einu ferðini, har Hans Pauli var rangstaddur, tá hann fekk bóltin í netið, var ongin upplagdur málmøguleiki hjá heimaliðnum.

Fuglfirðingar royndu at leggja eitt ávíst trýst, men tað var sjáldan at boð vóru eftir René Tórgarð í EB/Streyma-málinum, og tí komu heldur ongi mál í seinna hálvleiki.

### Øktu um fjarstøðuna

Dysturin millum topp og botn í Formuladeildini endaði harvið við einum tryggum 2-0 sigri til EB/Streym. Sama úrslit sum í fyrsta dystinum partanna millum í ár, tá teir leiktu á Mølini, men stóri munurin á dystinum nú og tá var, at hesaferð háláði EB/Streymur sigurin í hús í fyrra hálvleiki, meðan tá komu tey trý stigini ikki til hølvdar fyrr enn í seinastu minuttunum av dystinum.

Eftir tveir dystir uttan ein sigur, reisti oddaliðið seg aftur og fjarstøðan til næstu liðini er nú fimm stig. Hjá fuglfirðingum sær tað hinvegin trupult út. ÍF liggur aftast, og er eitt stig aftanfyri B68. Tað kunnu teir tó ikki brúka til so nógv, tí seks stig eru upp til VB/Sumba, sum liggur omanfyri niðurflytingarmarkið.

Sí annars kykmyndir á www.portal.fo har mál, hæddarpunt og samrøður eru at síggja

## FAKTA

**EB/Streymur – ÍF 2-0 (2-0)**
1-0: Arnbjørn Hansen, 19.
2-0: Hans Pauli Samuelsen, 32.

**EB/Streymur:** René Tórgarð – Gert Hansen, Egil á Bø (Esmar Eiðisgarð, 81.), Fróði Clementsen, John Heri Dam – Teitur Joensen (Leif Niclasen, 63.), Rafal Kwiecinski, Bárður Olsen, Sorin Anghel, Hans Pauli Samuelsen – Arnbjørn Hansen (Brian Olsen, 88.).
**Gul kort:** Egil á Bø, Bárður Olsen

**ÍF:** Andras Gango – Áki Petersen, Árni Petersen, Símin Eliasen, Frank Poulsen – Dánjal Pauli Højgaard (Amin Fallah, 75.), Høgni Zachariassen, Christian Solberg, Alexander Jovevic (Tòrður Lervig, 46.), Nenad Carich – Hanus Eliasen (Hjalmar Dalbú, 86.).
**Gul kort:** Dánjal Pauli Højgaard, Christian Solberg, Tórður Lervig.

**Dómari:** Dagfinn Olsen.

# Egil úti móti NSÍ

**Egil á Bø, sum fekk ein skaða í dystinum móti ÍF, og ikki verður við í móti NSÍ sunnudagin, vísir aftur, at talan var um gummibein hjá felagsliðnum undan dystinum í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tíggju minuttir fyri leiklok varð liðformaðurin hjá EB/Streymi styðjaður av vøllinum og síðani skiftur út. Tað sá onki serligt út hjá Egil, og tá vit fingu orðið á hann eftir dystin greiddi hann soleiðis frá:

– Eg og ein fuglfirðingur hoppaðu upp eftir einum bólti. Bein okkara fløktust saman, og eg lendi so mikið skeivt, at eg beklaði. Eitt hendiligt óhapp, men beini sær onki serliga gott út nú. Tað er fótliðurin, ið er meiddur og eg haldi tað eru liðbondini, sum ikki hava tað so gott. Fóturin er so rættiliga hovin og eri verið heilt víst ikki við sunnudagin móti NSÍ, sigur Egil á Bø, liðformaður hjá EB/Streymi.

Hetta er ein svárur missur hjá EB/Streymi, tí vanligi partamaðurin hjá Egil í miðverjuni, Marni Djurhuus, er eisini úti við skaða, og óvíst er nær hann kemur fyri seg.

Men hóast skaðan, sum Egil á Bø júst hevur fingið, er lagið gott á honum.

– Vit spældu ein fínan fyrra hálvleik, har vit vóru rættiliga ágrýtnir. Seinni hálvleikur var merktur av óruddiligum spæli, men eg haldi, at vit høvdu tamarhald á støðuni alla tíðina og sigurin var ongantíð í vanda. Tvørtur ímóti var hann fult uppiborin og helst átti hann at verið størri, staðfestir Egil á Bø.

### Ongi gummibein

Eftir tapið fyri B36 byrjaði tosið um møgulig gummibein á Mølini, men hesum vísir liðformaðurin hjá EB/Streymi aftur.

– Nei, her eru als ongi gummibein. Vit byrjaðu seinnu hálvu við nøkrum strævnum dystum, har vit fyrst vinna á KÍ í Klaksvík, síðani spæla javnt í móti HB á Mølini og so tapa fyri B36 í Havn. Hetta eru alt truplir dystir, og undan dystinum móti B36 høvdu vit fyrr í ár verið tríggjar ferðir í Gundadali og vunnið hvønn dyst. So at vit tapa ein av fýra dystum í Gundadali, haldi eg ikki vera so galið.



*– Egil á Bø verður heilt víst ikki við sunnudagin móti NSÍ, eftir skaðan hann fekk í fótin í gjárkvøldið ~*

*Mynd Sofus D. Johannesen*

– Vit hava alla tíðina trúð upp á okkum sjálvar, og tað gera vit framvegis nú vit hyggja fram ímóti dystinum móti NSÍ sunnudagin, sigur skaddi liðformaðurin hjá EB/Streymi, Egil á Bø.